Fróðskaparsetur Føroya

26. januar 2007

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 1/2007

Tíð: Fríggjadagin 26. januar 2007 kl. 13-14.45
Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Eivind Weyhe, vararektari og megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 10/2006 setursráðsfundi 14. desember 2006.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti og útseting av einum máli.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Býti av fíggjarjáttan 2007.** (J.nr. 0015-01855). *Fundarskjøl: Uppskot til býti 2007, dagfest 19. januar og endurskoðað uppskot, dagfest 26. januar. Umsóknir frá vísindastarvsfólkum á Føroyamálsdeildini um játtan til ymisk tiltøk, dagfest 26. januar 2007.*
Setursskrivarin vísti á, at tað eru fleiri stórar broytingar í framrokningunum og at býtið millum løn og rakstur er nakað skeivt. Hon vísti eisini á, at hóast dagførdar mannagongdir, er fíggjarstýringin enn ikki nóg neyv. Hon mælti frá at gera formligt býti á fundinum, og mælti í staðin til at broyta fíggjarætlanar og –stýrings-mannagongdina. Uppskotið varð umrøtt og samtykt varð at royna at miðsavna bókhaldið meira. Setursskrivarin samskiftir við deildirnar fyri at fáa neyvari ætlan fyri, hvussu hetta kann skipast. Kallað verður inn til fíggjarfundar um hálvan februar.

4. **Góðkenning av lýsing eftir vísindafólki til Náttúruvísindadeildina.** (J.nr. 0021-01984). *Fundarskjøl: Uppskot til lýsing á føroysku og enskum, dagfest 25. januar 2006.* Uppskotið til lýsing varð viðgjørt. Lýsingin góðkend. Náttúruvísindadeildin og Setursskrivstovan arbeiða víðari við málinum.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Upptøka til lestrarárið 2007/2008.** (J.nr. 0040-01979). Náttúruvísindadeildin tekur møguliga upp til stødd/-alisfrøðilinjuna, endalig avgerð tikin eftir eina spurnarkanning millum miðnámsskúlanæmingar í næstum. Annars eingin upptøka í 2007.

6. **Upptøkureglur fyri útlendsk gestalesandi.** (J.nr. 0040-01901). Útsett til næsta fund.

7. **Uppskot frá Søgu- og Samfelagsdeildini um at skipa fyri temadegi fyri undirvísarar á setrinum.** (J.nr. 0040-01987). Elin Súsannna Jacobsen skeyt upp at skipa fyri temadegi um vegleiðing av studentum við uppleggi frá onkrum útlendskum serfrøðingi. Endamálið er bæði at fáa inspiratión úr øðrum londum og at fáa skift um vitan deildanna millum. Evni kunnu vera: Hvat er góð vegleiðing og Hvat kann ein studentur vænta sær av vegleiðing og hvussu skulu partarnir fyrireika seg til vegleiðing. Semja um at hetta er eitt gott tiltak, sum eigur at verða fyriskipað. Heitt varð á Søgu- og samfelagsdeildina og Setursskrivstovuna um at arbeiða víðari við málinum.

8. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundir á Føroyamálsdeildini 19.12.06 og 23.1.07.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 16.1.07.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

9. **Metingarnevnd til Ph.D.-ritgerð hjá Høgna Hammershaimb Debes. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini hevur setursráðið millum funda góðkent hesa metingarnevnd: Dr. Fransisco Rey, Havforskningsinstituttet, Bergen, Dr. Roger Philip Harris, Plymout Marine Laboratory, Plymouth og Dr. Jan Arge Jacobsen á Fiskirannsóknarstovuni. At staðfesta.** (J.nr. 0043-01102). Staðfest.

10. **Próvdómaragóðkenning. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Jens Gravesen, lektara á Institut for Matematik á Danmarks Tekniske Universitet sum próvdómara *Innan støddfrøði*. At staðfesta.** (J.nr. 26-01525). Staðfest.

11. **Góðskrivingar. Føroyamálsdeildin mælir til hesar góðskrivingar:**

   a. **Sigfríður Abrahamsen fær *Grundskeið í vísindaástøði 5 ECTS* á søgulestrinum góðskrivað fyri part av *Vísindaástøði 8 ECTS* á hjánámi í føroyskum**
   b. **Marianna Hoydal fær skeið frá Københavns Universitet góðskrivað á BA-lestrinum: *Tekstanalyse* fyri *Greining 12 ECTS*, *Massekommunikation og massekultur* fyri *Samskifti 8 ECTS*, *Litteraturhistoriske hovedværker* fyri *Bókmentasøgu I 10 ECTS* og *Litteraturteori og kritikhistorie* fyri *Vísindaástøði 8 ECTS***
   c. **Malan Poulsen fær skeið frá Københavns Universitet og Roskilde Universitetscenter góðskrivað á BA-lestrinum: *Folkloristik* (KU) fyri**

***Skaldskap av manna munni II 8 ECTS*, *Kommunikations- og tekstvidenskab* (RUC) fyri *Greining 12 ECTS* og part av *Bókmentasøgu I 10 ECTS*, *Historisk metode* (RUC) fyri restina av *Bókmentasøgu I 10 ECTS*, *Norsk* (RUC) fyri tvey av málunum í *Norðurlendsk mál 8 ECTS* soleiðis at hon bara skal taka íslendskt afturat og *Humanistisk videnskabsteori* (RUC) fyri *Vísindaástøði 8 ECTS*.**

**At góðkenna.** (J.nr. 0046-01982 og 0046-01983). Góðkent.

**Kunningarmál:**

**12. Mánaðarjavni ultimo desember 2006, nýtsla fyri alt setrið 18.043.900 kr = 94,6% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01595).

**13. Umvælingar í 2007. Reins hús: Mála garagu, vindskeiðir og stakitt, Náttúruvísindadeildin: Skifta vindeygalás, Føroyamálsdeildin: Skifta punkteraðar rútar og pussa síðurnar á trappuni, Søgu- og Samfelagsdeildin og Setursskrivstovan: Seta útlufting á septiktangarnar.** (J.nr. 0015-01871).

**14. Bøkur og rit:**

a. **Erhard Jacobsen: Og so veit eg eina vakra søgu, Bókadeild Føroya Lærarafelags 2006**
b. **Stjórnarskipan Føroya, álit frá Stjórnarskipanarnevndini, 18. desember 2006**
c. **The Danish Education System, Higher Education and Lifelong Learning, Sirius 2006**
d. **Tal om de danske universitetet, Rektorkollegiet dec.2006.**

Frágreiðing: Annika Sølvará